

Helge Lund, stjóri í BG Group. Mynd: Harald Pettersen/Statoil

# Helge Lund gevst í BG Group

**Jógvan Hugo Gardar**

08.04.2015 - 10:23

Oljan.fo

Stjórin í Shell, Ben van Beurden, sigur sambært CNBC, at Helge Lund, ið er stjóri í BG Group, ikki kemur at halda fram í fyritøkuni, nú Shell keypir BG Group.

van beurden sigur at Lund ætlar sær at "gera okkurt sjálvur".

- Helge Lund hevur boða frá at hann stuðlar avtaluni, sigur van Burden til sjónvarpsrásina hjá Financial times.

Helge Lund, sum var stjóri í Statoil, byrjaði í starvinum sum stjóri fyri BG Group í februar í ár.

Í einum tíðindaskrivi sigur Helge Lund í morgun, at yvirtøkan kemur at taka tíð, og at hann og hansara nærmasta toymi kemur at gera tað sum skal til fyri at BG Group kann gerast ein partur av Shell.

Í morgun boðaði Shell frá at ætlanin er at keypa BG Group fyri góðar 470 milliardir krónur, nakav sum er 50 prosent omanfyri marknaðarvirði á fyritøkuni, sambært keypsskálanum í London.